## Henrik droymir um superliguna

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin, sum fyri stuttum segði farvæl við Køge, sigur seg vera opnan fyri øllum tilboðum, men hann nevnir ikki møguleikan at venja í Føroyum. – Tú gerst ikki altíð sjálvur av, hvar tú hevur møguleika at verða venjari. Men tað skal eingin ivi vera um, at eg ógvuliga fegin vil vera venjari í einum felag, sum spælir í superliguni. Eg havi ambitiónir, og eg eri opin fyri øllum tilboðum, sum eg møguliga fái, sigur Henrik Larsen, sum í løtuni verður settur í samband við AC Horsens. Umframt at venja føroyska landsliðið hevur Henrik Larsen verið venjari í Ølstykke og í Køge.



## Sylla givin á Malta

Amed Davy Sylla, sum áður hevur spælt við bæði ÍF og B36, heldur ikki fram í maltesiska felagnum Birkirkara. Hetta staðfestir umboðsmaður hansara, Jákup í Stórustovu. – Tað er satt, at Sylla er givin á Malta. Hann hevur fingið tilboð frá ymiskum feløgum, og endalig avtala kemur upp á pláss skjótt. Eg fái ikki sagt meira, staðfestir umboðsmaðurin. Fílabeinsstrandingurin hevur seinasta hálva árið verið ein av lyklaleikarunum hjá Birkirkara, men skiftir nú til annað felag.

# 50 ár síðani HM var í

**HM-endaspælið, sum fór fram í Svøríki fyri 50 árum síðani, verður av mongum skýrt at verða hitt síðsta idyliska, fólksliga heimsmeistaraskapið í fótbólti, áðrenn kommersialiseringin fekk ov stórt vald í fótbólti**




**FÓTBÓLTUR**
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Svenskarar hava við einum stórum nostalgiskum smíli minst aftur á dagarnar á sumri fyri hálvari øld síðani, tá teir vóru vertir fyri HM-endaspælinum í 1958. Í eygunum hjá mongum var HM-endaspælið í 1958 tað síðsta idyliska og fólksliga HM-endaspælið, áðrenn kommersialiseringin veruliga gjørdi innrás í heimsfótbóltin.

HM-dystir vórðu spældir í lutfalsliga smáum býum sum Uddevalle í Vestursvøríki, og í Sandviken í Eystursvøríki. Smádreingir sótu uppi í trøum og eygleiddu Garrincha, og hinar brassarnar, tá teir vístu síni kynstur fram undir venjing. Nógv áttu ikki sjónvarp tá, og fólk stúgvaðust frammanfyri handilsrútarnar hjá teimum, sum sýndu sjónvørp fram, fyri at síggja dystirnar.

### Gekk framúr væl

Tað gekk framúr væl hjá Svøríki, bæði við at skipa fyri HM-endaspælinum og á leikvøllinum, svenska fótbóltslandsliðið vann silvur.

Svenska fótbóltssambandið hevði sett tann tá 50 ára gamla onglendingin, George Raynor í starv, fyri at kunna røkka einum góðum úrsliti á heimavølli. Raynor var kendur sum ein sera dugnaligur venjari tá, og hevði hann ført Svøríki til OL-gull í 1948. Í dystunum undan HM-endaspælinum í 1958 gekk ikki heilt eftir vild. Raynor eksperimenteraði nógv við liðnum, broytti taktikk frá dysti til dyst, og var svenski fótbóltsalmenningurin óttafullur um, hvussu tað mundi fara at ganga hjá teimum gulu og bláu.

Svenskarar vunnu fyrsta dystin í bólkaspælinum 3-0 á Mexico. Agne Simonson skeyt tvey mál, og Nils Liedholm, sum seinni eisini gjørdist ein venjaralegenda, skoraði uppá brotsspark.

Næsta dystin í bólkaspælinum vunnu sviar 2-1 á Ungarn, sum hevði havt heimsins besta fótbóltslið síðst í 1940-unum, og fyrst í 1950-unum. Kurt Hamrin skoraði bæði tey svensku málini, Tichy skoraði fyri Ungarn.

Sviar skuldu bara hava javnt ímóti Wales í síðsta dystinum í bólkaspælinum, og dysturin endaði 0-0. Walisarar fylgdu svium til fjórðingsfinaluna, og er hetta einasta ferðin, at Wales hevur tikið lut í einum endaspæli.

Í fjórðingsfinaluni vunnu sviar 2-0 á Sovjetsamveldinum. Kurt Hamrin og Agne Simonson skoraðu svensku málini.

Svenska tjóðin var nú á gosi, næsti dysturin var ímóti vesturtýsku heimsmeistarunum, og skuldi slagið standa á Ullevi Leikvøllinum í Göteborg. Schäfer legði Vesturtýskland á odda eftir 24 minuttirs spæl, men longu átta minuttir seinni hevði Lennart “Nacka” Skoglund javnað fyri Svøríki. Heilt ímóti dystarenda skoraðu Gunnar Gren og Kurt Hamrin fyri Svøríki. Alt Ullevi var á gosi, Svøríki var í sínari fyrstu HM-finalu nakrantíð, og týsku heimsmeistarnir máttu geva trónuna frá sær.

### Komu í finaluna

Í finaluni møtti Svøríki Brasil, sum hevði spæl framúr væl í kappingini. Í hálvfinaluni vunnu brasiliumenn 5-2 á Fraklandi. Finalan á Råsunda Leikvøllinum í Stockholm byrjaði væl fyri heimaliðið. Tá fýra minuttir vóru spældir, hevði Nils Liedholm lagt Svøríki á odda, og heimafjøldin byrjaði at fáa stórar vónir. Svøríki var heimsmeistari í fimm minuttir. Í níggjunda minutti javnaði Vavá fyri